# Eitt stórt afturstig fyri føroyska mentan

**Nú skulu vit eisini gjalda mvg av bókum, heldur ein arbeiðsbólkur undir fíggjarmálaráðnum. So verða bøkur 25% dýrari og tað er eitt stórt bakkast, sigur størsti útgevari í landinum**

BØKUR OG MVG
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*




– Tað hevði verði eitt stórt afturstig.

Tað sigur leiðarin á Bókadeild Føroya Lærarafelags um úrslitið hjá einum arbeiðsbólki.

Tað er ein arbeisbólkur hjá fíggjarmálaráðnum, sum nú mælir til vit eisini skulu betala mvg av bókum.

– Hetta fer at gera bøkur 25% dýrari og tað verður eitt stórt afturstig fyri føroyska mentan og føroyskan mentanarpolitikk, sigur Niels Jákup Thomsen, leiðari á Bókadeild Lærarafelags.

Hann ivast ikki í, at avleiðingin av tí hevði verið, at fólk høvdu keypt færri bøkur.

– Sotatt hevði tað verið enn truplari enn tað er hjá føroyskum forløgum at fingið endarnar at rokkið saman. Og avleiðingin av tí hevði so aftur verðið, at tað hevði verðið truplari at givið bøkur út, tí so fáa forløgini minni pening at arbeiða við.

– Eg síggi fyri mær, at tað fer at verða ógvuliga nógv truplari at fáa endarnar at røkka saman, leggur hann afturat.

Hann vísur á, at í Íslandi hava tey ikki mvg á bókum og tað hava tey heldur ikki í Onglandi. Eisini í øðrum norðanlondum eru tey við at ganga somu leið.

Niels Jákup Thomsen sigur, at sjónarmiðið er netupp tað, at bøkur eru í eini serstøðu og at tað er neyðugt at stuðla bókaútgávu sum eitt lið í einum virknum mentanarpolitikki, tí eru tað lond.

Hann vísur eisini á, at skrivandi orðið er undir hørðum trýsti, bæði frá sjónvarpi og telduspølum.

*Verður mvg lagt á bøkur, er tað ikki bara mvg lógin og nakrar krónur, tað snýr seg um. Tað stendur nógv meiri upp á spæl enn so, sigur Niels Jákup Thomsen, leiðari í Bókadeild Føroya Lærarafelags*

Og júst í verður tað mett at hava alstóran týdning at royna at stimbra hugin at lesa, helst hjá børnum og ungum.

### Nógv upp á spæl

Bòkadeild Føroya Lærarafelags er størsta forlag í landinum. Í fjør góvu tey 52 bøkur út og í ár verða tað 47 bøkur.

– Vit hava 2500 limir í bókaklubbanum. Tey flestu av hesum eru ung húski við børnum.

– Hetta eru mangan fólk, sum ikki hava so nógvan pening um hendi. Verða bøkurnar nú 25% dýrari, er vandi fyri, at tey fara at halda uppat at keypa bøkur tað er eitt ógvuliga stórt afturstig fyri børnini og tey ungu.

Hann ásannar, at mvg er stuðul til bókaútgávu.

– Men tað er tí, at politikarar hava hildið, at tað hevur verið vert at stuðla.

– Í Danmark er fult mvg á bókum og tað halda tey, sum fáast við nøkur, er eitt stórur vansi.

– Kanningar vísa, at júst í Danmark stendur illa til við lesiførleikanum hjá børnunum og teimum ungu.

– Men har er heldur ikki nógv gjørt við at stimbra lesihugin hjá teimum ungu og hjá børnunum.

Niels Jákup Thomsen sigur, at í Føroyum er eisini ein kanning gjørd, sum bendir á, at lesiførleikin hjá børnunum og teimum ungu er heldur einki at reypa av.

– Tí er tað ógvuliga óheppið, at bøkur nú kanska verða 25% dýrari, tí tað ber á skeiva borðið, tí tá er vansi fyri, at færri fólk fara at keypa bøkur.

– Og tí er tað ikki bara mvg lógin og nakrar krónur, tað snýr seg um. Tað er nakað nógv týdningarmiklari, sum stendur upp á spæl og tað eiga hava fyri eyga, sigur hann.

# Fara at geva færri føroyskar bøkur út

**– Verður mvg lagt á bøkur, fer tað at ganga hart útyvir føroyska bókaútgávu, sigur Zakarias Wang, formaður í forleggjarafelagnum**

BØKUR OG MVG
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



– Hetta verður eitt rættiligt slag í høvdið á teimum, sum geva bøkur út.

Zakarias Wang, formaður í Felagnum Føroysk Bókaforløg, er avgjørt ikki fegin fyri útlitini til, at vit nú eisini skulu betala mvg av bókum.

Hann sigur, at eitt er tað fíggjarliga úrslitið hjá landskassanum.

Men hann ivast ikki í, at hetta eisini fer at føra við sær, at fólk fara at keypa færri bøkur.

– Hetta fer at gera tað nógv truplari hjá forløgum at geva bøkur út. Tað vildi verið stórt spell, tí frammanundan hava vit alt ov fáar føroyskar bøkur: Vit hava ov lítið av barnabókum, og lítið av ungdómsbókum og ov lítið av bókum til vaksin.

*– Í næsta grannalandi okkara, Stóra Bretlandi, er onki mvg á bókum, tí tey halda, at tað hevur stóran týdning at bøkur verða givnar út. Og so halda tey eisini, at tað er ósømuligt at taka mvg av bíblium, sigur Zakarias Wang, formaður í forleggjarafelagnum*

Hann vísur á, at í flestu førum gevur tað í nógvum førum hall at geva bøkur út. Verður mvg nú lagt á bókasølu, fer tað at føra við sær, at enn færri fara at hætta sær at geva bøkur út. Hetta heldur hann er serliga óheppið nú tað verður so nógv tosað um at stimbra lesihugin og lesiførleikan hjá børnum og ungum fyri at standa ímóti kappingini frá sjónvarpi og telduspølum.

Formaðurin í forleggjarafelagnum vísur eisini á, at hóast londini í Europa hava mvg, er tað bera eitt land, sum hevur hægsta mvg á bókum, og tað er Danmark.

– Í næsta grannalandi okkara, Stórabretlandi, eru bøkur mvg-fríar, akkurát sum hjá okkum. – Grundgevingin er, at tað hjálpir til at fáa bøkur út, og tað halda teir hava stóran týdning. – Og eitt sum verður ført fram í hesum sambandi, er, at tað verður hildið at vera ósømuligt at taka mvg av bíblium, sigur hann.

Zakarias Wang vísur eisini á, at tað, at bøkur eru mvg-fríar, er einasti stuðul, sum føroyskar bøkur fáa, og sum ikki er kappingaravlagandi afturímóti tí stuðuli, ið summi forløg fáa framum onnur.

– Hann mælir landsstýrinum fyrst til at javna kappingina ímillum forløgini, áðrenn hugsað verður um mvg.

### FAKTA

Tað finst eingin góð grundgeving fyri, at bøkur skulu frítakast fyri meiriviðisgjald. Hetta er ein óbeinleiðis stuðul til bókasølu umvegis meirvirðisgjaldslógina, sum ikki er ætlað at vera ein stuðulslóg. Bøkur er ein vanlig vøra, eins og disklar og ljóðbond, sum eru meirvirðis-gjalds-skyldug. Sama er galdandi fyri tíðindabløð og prenting fyri tíðindabløð.

**Arbeiðsbólkurin hjá Fíggjarmálaráðnum um bøkur og mvg**



# Sjógvarnir bróta framvegis

**Eingin loysn er funnin á ósemjuni millum býráðspolitikararnar Elina Lindenskov og Torfinn Smith. Formaðurin í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag, Bjarki Mohr, vónar og væntar, at bæði nøvnini verða at síggja á listanum hjá Javnaðarflokkinum til býráðsvalið í november**

BÝRÁÐSVAL
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Tað er framvegis ógreitt um Tórfinn Smith og Elin Lindenskov fara at stilla upp á sama lista til býráðsvalið í november. Formaðurin í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag, Bjarki Mohr, vónar at síggja bæði nøvnini á listanum*

*Mynd: Savnsmyndir*

Hósdagin verður 2. uppstillingarfundur hjá Suðurstreymoyar Javnaðarfelag til býráðsvalið á skránni. Seinasta valskeið hevur verið rættiliga margháttlig og buldraligt hjá Javnaðarflokkinum, tí flokkurin hevur bæði havt umboðan í meirilutanunum og í minnilutanum í Tórshavnar býráð.

Tórfinn Smith gjørdi tíðliga í valskeiðnum av at royna seg saman meirilutanum í Tórshavnar býráð, meðan hitt umboðið hjá Javnaðarflokkinum í Tórshavnar býráð, Elin Lindenskov, framvegis var partur av minnilutanum.

Elin Lindenskov gjørdist rættiliga ørg inn á avgerðina hjá partamanninum, og sló fast, at hon á komandi býráðsvali ikki ætlaði sær at stilla upp á sama lista sum Tórfinn Smith. Nú stendur býráðsval aftur fyri durum, og brotasjógvarnir millum Elina og Tórfinn hava framvegis ikki lagt seg.

### Heldur fast

Á seinasta býráðsvali í 2001 fekk Elin Lindenskov 392 persónligar atkvøður. Størsti atkvøðuslúkarin hjá Javnaðarflokkinum á seinasti býráðsvali hevur framvegis somu støðu í málinum, og hon ætlar sær ikki á sama lista sum Tórfinn Smith.

– Í prinsippinum havi eg somu støðu. Eg havi kortini fingið fleiri áheitanir um at sleppa hasi støðuni, men eg vóni framvegis, at hann ikki stillar upp, sigur Elin Lindenskov.

Tá Javnaðarflokkurin í Tórshavnar býráð fór í tvíningar í mai mánaði 2002, gjørdi Suðurstreymoyar Javnaðarfelag greitt, at flokkurin stuðlaði Elini og var framvegis í minniluta í býráðnum, hóast annar býráðslimurin var farin til meirilutan.

Elin Lindenskov sigur seg ikki kenna støðuna hjá nýggju nevndini í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag í málinum.

– Nýggja nevndin hevur ikki meldað greitt út, hvat hon heldur, vísir Elin Lindenskov á.

### Limirnir gera av

Formaðurin í umhvørvis- og heilsunevndini seinastu tvey árini, Tórfinn Smith, sigur seg vera sinnaðan at stilla upp fyri Javnaðarflokkin, um limirnir í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag ynskja tað. Býráðslimurin hjá Javnaðarflokkinum í meirilutanum tekur ikki útsøgnina hjá Elini Lindenskov um, at hon ikki ynskir at vera á sama lista sum hann, so nær.

– Ja eg havi hoyrt útsøgnina. Mær vitandi eru tað limirnir í felagnum, sum gera av, hvør stillar upp fyri flokkin. Eg havi ongantíð hoyrt um nakað valevni sum setur treytir fyri, hvørji onnur valevni skulu vera á listanum og ikki, sigur Tórfinn Smith.

Spurdur, um hansara avgerð ikki hevur verið við til at skaða umdømið hjá Javnaðarflokkinum í Tórshavnar býráð, svarar hann, at tað er ringt at siga.

– Sjálvandi er hetta ein óheppin støða, men eg eri framvegis sannførdur um, at eg tók røttu avgerðina, vísir formaðurin í umhvørvis- og heilsunevndini á.

Á seinasta býráðsvali fekk Tórfinn Smith 244 persónligar atkvøður og endaði á øðrum plássi á javnaðarlistanum í Havn. Grundgevingin hjá honum at fara upp í meirilutan var, at hann fekk størri ávirkan í samgonguni.

*Væntar tú, at tínir veljarar kenna seg sviknar eftir, at tú í sjálvdrátti fór upp í meirilutan?*

– Tað er ómetaliga ringt at siga, tí eg kenni ikki mínar persónligu veljarar. Eg rokni við, at tey sum hava valt meg havi ynskt, at eg kundi gera meg galdandi í býráðsarbeiðinum. Sum veljari hevði eg kent meg sviknan um mítt umboð í býráðnum ikki hevði tikið av møguleikanum at fáa ávirkan í býráðsarbeiðinum, sigur Tórfinn Smith.

### Ynskja bæði

Bjarki Mohr er formaður í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag, og hann bæði vónar og væntar, at Tórfinn Smith og Elin Lindenskov verða millum nøvnini á Javnaðarlistanum til býráðsvalið í november.

– Eg vóni, at vit kunnu leggja ósemjuna millum Elina og Tórfinn aftur um okkum. Uppgávan hjá felagnum er at tryggja, at vit í komandi valskeiði standa saman sum ein maður, sigur Bjarki Mohr

Spurdur um støðan hjá Elini Lindenskov fer at elva til ófrið í felagnum undan 2. og 3. uppstillingarfundi, svarar formaðurin í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag, at hann er keddur av støðuni hjá Elini, og útihýsir hon møguleikan at standa á sama lista sum Tórfinn, so tað hennara persónliga val, og als ikki støðan hjá felagnum.

*Væntar tú, at ósemjan millum býráðspolitikarnar hjá Javnaðarflokkinum fer at skaða flokkin á komandi vali?*

– Tað er ringt at siga. Tað er púra vist, at eingin vinnari er í hesum málinum. Vit mugu bert bíða til valið er av, og ikki fyrr enn tá síggja vit um tað hevur skatt flokkin, sigur Bjarki Mohr.

# Summartónar og Jazzfestivalurin kasta sama

**– Tað eru somu fólk sum ganga aftur í samband við fyrireikingarnar av Jazzfestivalinum og Summartónum. Flestu av okkara klassisku tónleikarum eru eisini virknir innan jazztónleikin, og tí haldi eg tað er skilagott at leggja tiltøkini saman, sigur Kristian Blak**

SAMANLEGGING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Havnar Jazzfelag og felagið Føroysk Tónaskøld hava gjørt av at leggja Summartónar og Jazzfestivalin saman.

– Tað eru somu fólk sum ganga aftur í samband við fyrireikingarnar av Jazzfestivalinum og Summartónum. Flestu av okkara klassisku tónleikarum eru eisini virknir innan jazztónleikin, og tí haldi eg tað er skilagott at leggja tiltøkini saman, sigur Kristian Blak.

Seinastu vikurnar hava feløgini fundast um samanleggingina, og limirnir í Havnar Jazzfelag og Føroysk Tónaskøld eru á einum máli um, at tað er skilagott at leggja tiltøkini saman.

Endamálið hjá feløgunum er framvegis óbroytt, og við samanleggingini ynskja fyrireikararnir framvegis, at tiltakið verður ein grundarsteinur hjá føroyskum tónleikaskøldum og tónleikarum.

### Fyrireika

Nýggi samanlagdi festivalurin fer at bera heitið Summartónar. Fyrireikingarnar til summartónar 2005 er farnar av bakkastokki. Aldubáran fyllir 10 ár komandi ár, og bólkurin verður eitt av høvuðsnøvnunum á tiltakinum. Tað er eisini greitt, at danski bólkurin Duo Saxopran verður millum nøvnini á Summartónum 2005.

Kristian Blak greiðir frá, at í løtuni arbeiða fyrireikarnar at fáa Susanne Lundberg og Marilyn Mazur, Josefine Cronholm og Anders Jormin Trio til Føroyar komandi summar.



*Havnar Jazzfelag og felagið Føroysk Tónaskøld hava gjørt av at leggja Summartónar og Jazzfestivalin saman. Á myndini síggjast umboðini fyri Havnar Jazzfelag og Føroysk Tónaskøld, Heðin Ziska Daviden og Kristian Blak.*

*Mynd: Jonhard Hammer*